

Mynd: Maersk

# Fíggjarliga tungt hjá pørtum av Mærsk-samtakinum

**Jógvan Hugo Gardar**

09.11.2015 - 12:30

Oljan.fo

Yvirskotið hjá A.P. Møller-Mærsk vísir 4,5 milliardir í triðja ársfjórðing, men tað er bara helvtin av yvirskotinum somu tíð í 2014. Hetta vísa roknskapartølini sum blivu løgd fram beint áðrenn vikuskiftið. Og tað merkir at roknimaskinan má fram og neyvari roknistykkir skulu til fyri at loysa tað sum er av krevjandi støðum í fyritøkuni. Oljuprísurin og lægrin inntøkur í bingupartinum gera at inntøkurnar ikki eru tær somu hjá danska risanum.

**Maersk Line**

Hesin parturin av fyritøkuni hevur tað tungt, tí ov nógv eru um at bjóða sínar tænastur í hesum marknaðinum, samstundis sum innflutningurin til Evropa minkar.

Maersk Line tryggjar A.P. Møller fjórðu hvørja krónu í inntøkum. Broytingar hjá hesum dótturfelagnum merkist tí gott í samlaða rokniskapinum.

Maersk Line boðaði fyri viku síðani at 4.000 størv skulu burtur, og samstundis hevur fyritøkan sagt upp avtalur um bygging av nýggjum skipum.

**Maersk Oil**

Oljuprísurin sæst gott aftur í inntøkum hjá Maersk Oil. Prísurin á olju er í dag millum tíggju og 15 dollarar lægri enn sama tíðarskeið í 2014. Fyri Maersk Oil merkir eitt sveiggj í oljuprísinum við 10 dollarum at 616 milliónir meir ella minni í inntøkum.

Maersk Oil hevur avgjørt at 1250 størv skulu burtur.

**APM Terminals**

Eitt jaligt við bingjupartinum hjá A.P. Møller er at hesin parturin fær størri part av samlaða rokniskapin. Men hetta er ikki tí tey tjena meir, men tí tey ikki hava mist líka nógv í inntøkum sum hinar deildirnar. 11 havnastøðum í Evropa og Latín-Amerika. Við

APM Terminals hevur nýliga tryggja sær meirlutan av partabrøvunum í spanska Grup Maritim TCB, og fekk við tí atgongd og eftirlit við 11 havnastøðum í Evropa og Latín-Amerika. Við hesum hevur APM Terminals nú 74 havnastø ðir í 40 londum í fimm heimspørtum.

**Maersk Drilling**

Her er fyrsta roknskaparøkið hjá danska risanum sum hevur framgongd. Maersk Drilling økti umsetningin við 23 prosentum farna ársfjórðingin til 4,4 milliardir krónur.

**APM Shipping Services**

Hetta er eitt øki har sum gongur gott, og annað minni gott. Umsetningurin minkaði við 15 prosentum til 8,9 milliardir krónur, samstundis sum rakstrarúrslitið gjørdis 19 prosent betri, til eina góða milliard krónur.

Maersk Supply Services hevur havt lægri umsetning orsakað av lægri písum og harðari kapping.

Maersk Tankers fekk hjálp av betri prísum fyri at flyta ávís oljusløg. Maersk Tankers hevur hendan ársfjórðingin bílagt níggju nýggj skip í Korea. Hetta merkir at Maersk Tankers komandi trý árini fær 17 nýggj skip.

*Berlingse Business hevur hugt gjølla eftir ymsu pørtunum av rokniskapinum, og tann gjøgnumgongdin sæst her.*